# Fjølmiðlanevndin - avgerðir

| Mál nr. :<br>16/00357 | Lóg:<br>Løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2007 § 34. | Avgerð tikin:<br>08.05.2017 |
|---|---|---|

## Kært ov seint. Kæran avvíst.


**Samandráttur:**
**Kært er um tíðindaflutning hjá Kringvarpi Føroya, frá miðskeiðis í 2015, sum snýr seg um virksemi hjá reiðaríi. Kringvarp Føroya hevur víst málið frá sær, tá ið kæran er innlatin meira enn eitt ár eftir, at kærdu innsløgini eru almannakunngjørd.**
**Fjølmiðlanevndin hevur avgjørt at avvísa kæruna, grundað á, at kært er ov seint, sbr. § 34 í lógini um fjølmiðlaábyrgd. Víst er ikki á umstøður, sum geva grundarlag fyri, at víkja frá kærufreistini.**


Kært er um tíðindaflutning í Kringvarpi Føroya, frá miðskeiðis í 2015, sum snýr seg um virksemi hjá einum reiðaríi. Kærarin var ónøgdur við tíðindaflutningin í sambandi við reiðaravirksemi sítt, og metti ikki hendan verða rættan.

Kæran er send Kringvarpinum í desember 2016, meira enn eitt ár eftir, at kærdu innsløgini vóru almannakunngjørd.

**Lógargrundarlag**

§ 34 í løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2007.

**Avgerðin hjá Fjølmiðlanevndini**

Til at viðgera hetta mál var Fjølmiðlanevndin mannað við J, formanni, og nevndarliminum E, I, og Ei.

Sum longu nevnt er kært um tíðindaflutning hjá KvF, sum er farin fram í 2015. Kæran er at byrja við send til KvF í desember 2016.

Viðvíkjandi avgerðini hjá KvF, at avvísa kæruna, tí kært er ov seint, skal at byrja við viðmerkjast, at kært er uttan iva ov seint.

Sambært § 34, stk. 2 og 3 í fjølmiðlaábyrgdarlógini, skal kærast til fjølmiðilin innan 4 vikur eftir, at upplýsingarnar eru almannakunngjørdar.

Í hesum føri er talan um tíðindaflutning frá medio 2015, og kæran er send KvF í desember 2016, so kærufreistin er uttan iva farin. Spurningurin er tí, um umstøður eru, ið geva grundarlag fyri, at víkjast kann frá kærufreistini.

# Fjølmiðlanevndin - avgerðir

Grundarlagið fyri at víkja frá kærufreistini, er ikki ásett í lógini um Fjølmiðlaábyrgd. Tá talan er um eitt mál, sum bert er millum kæraran og miðilin, eru ongin atlit at taka til triðjapartar. Eitt møguligt frávik frá kærufreistini, má tí grundast á tey atlit, sum vanliga gera seg galdandi í tílíkum málum, um at víkja frá kærufreistini. Hesi atlit eru t.d. longdin á kærufreistini, hvussu lang tíð er liðin síðani kærufreistin er farin (hvussu nógv er kært ov seint), orsøkin til at kært er ov seint, hvønn týdning málið hevur fyri kæraran, um avgerðin er skilliga skeiv o.s.fr.

Sum útgangsstøði eru tað bert orsøkir, sum kærarin ikki hevur ræði á, sum til dømis sjúka, ið kunnu geva grundarlag fyri at víkja frá kærufreistini. Harafturat hevur tað serliga stóran týdning í tílíkum málum, hvussu lang tíð er liðin, síðani kærufreistin er farin. Ein kærari, ið hevur verið forðaður í at kæra rættstundis, skal sostatt kæra skjótast til ber, aftaná at freistin er farin.

Í hesum føri er meira enn eitt ár farið, síðani freistin at kæra er farin. Orsøkin til, at kært verður eftir kærufreistin er farin er, at kærarin hevur broytt meining í mun til at kæra, tí tíðindaflutningurin, sum kært er um, blívur við at vera tøkur og at hava fylgjur fyri kæraran. At kærarin broytir meining í mun til at kæra, grundað á umstøður, sum fara fram aftaná kærufreistina, gevur ikki grundarlag fyri, at víkja frá kærufreistini. Umstøðan, sum kærarin her vísur á, stendst í stóran mun av tøknini í dag. Flestallar upplýsingar eru í dag lætt atkomiligar á netinum, og er hetta ikki ein umstøða, ið Fjølmiðlanevndin skal taka atlit til.

Málið hevur tó uttan iva stóran týdning fyri kæraran, men í mun til hetta er aftur galdandi, at kærufreistin er farin fyri meira enn einum ári síðani, og tað talar ímóti fráviki frá kærufreistini.

Viðvíkjandi fylgjum annars, sum kærarin vísir á, viðvíkjandi møguligari ærumeiðing og endurgjaldi, so eru hesi ikki fevnd av málsræðinum hjá nevndini, og kunnu tey ikki grundað fráviki frá kærufreistini í hesum føri. Hesi viðurskifti metir Fjølmiðlanevndin ikki um, og vera tílík mál vanliga avgreidd í rættarskipanini.

Annars eru ikki viðurskifti at vísa á, ið kunnu geva grundarlag fyri, at víkja frá kærufreistini.

**Fjølmiðlanevndin hevur avgjørt at avvísa kæruna, grundað á, at kært er ov seint, sbrt. § 34 í lógini um fjølmiðlaábyrgd.**

**Vísandi til omanfyri standandi metir nevndin ikki, at serligar umstøður eru, ið geva grundarlag fyri, at víkja frá kærufreistini.**